# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg fekk gásarhold, tá eg kom at hugsa um, at eg kanska hevði sæð Madeleine McCann*

*(Clara Torres)*

## Hetta kann vera Madeleine



*Ein ljóshærd genta í Marokko. Kann tað vera Madeleine?*

Ein sponsk kvinna, sum var og ferðaðist í Marokko, fekk eyga á eina ljóhærda smágentu og tók mynd av henni. Er tað Madeleine McCann?

– Eg hvakk við, tá eg skilti, at hetta kundi vera Madeleine McCann, sigur Clara Torres við spanska útvarpið.

Herfyri var hon saman við einum ferðalagi í Marokko. Ein dagin tey komu koyrandi í bussi, varnaðist Clara Torres eina ljóshærda smágentu á bakinum á einari marokkanskari kvinnu.

- Eg og drongur mín sóu gentuna. Eg tók eina mynd út ígjøgnum vindeygað á bussinum. Vit tosaðu um, at hetta kundi vera Madeleine McCann, sum var horvin í Portugal, men vit skúgvaðu tankan frá okkum og gloymdu myndina, sigur Clara Torres við spanska útvarpið.

Nú hevur honm framkallað filmin og víst sponsku løgregluni myndina. Ein talsmaður hjá løgregluni sigur, at málið verður tikið í størsta álvara.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at fólk siga seg hava sæð Madeleine McCann í Marokko. Fyrr hava tvær kvinnur úr Bretlandi og Noregi boðað frá, at tær hildu seg síggja ta horvnu gentuna í býnum Marrakesh í summar. Tær báðar kvinnurnar hava einki við hvør aðra at gera.

## Munkar tiknir og bukaðir

**Hernaðarstýrið í Myanmar valdi at steðga mótmælisgongunum við makt**



*Alvápnað løgreglulið royndu at forða mótmælistiltøkunum, og fleiri fólk vórðu tikin*

Hóast útgongubann vóru fleiri túsund mótmælisfólk í gøtunum í størsta býnum í Myanmar, Yangon, í morgun. Men har vóru eisini væl vápnað løgreglulið, sum vóru komin inn í býin um náttina.

Tað varð skjótt týðiligt, at løgreglumenninir høvdu fingið boð um at steðga mótmælisgongunum. Teir tveittu fleiri granatir við táragassi eftir teimum mótmælandi, og tá tað ikki var nóg mikið, vórðu fleiri fólk tikin. Eygnavitni siga, at minst 80 munkar vóru millum tey tiknu, og at teir blivu bukaðir og drignir eftir vegnum.

Aðrar keldur vistu at siga, at fleiri andstøðufólk vórðu tikin seinastu nátt, og at Aung San Suu Kyi, andstøðuleiðari, varð flutt úr húsavarðhaldinum til eitt fongsul.

Fleiri lond hava ávarað hernaðarstýrið í Myanmar ímóti at steðga mótmælunum við harðskapi. ES hevur sagt, at tað fer at seta revsitiltøk í gildi alt fyri eitt, um stýrið nýtir harðskap og George W. Bush, forseti, segði í gjár, at USA hevur longu hert síni tiltøk ímóti hernaðarstýrinum.



*Shimon Peres er sera misnøgdur við, at iranski forsetin slapp á røðarapallin á Colombia University í New York*

## Júst sum við Hitler

**Ísraelski forsetin, Shimon Peres, heldur lítið um, at iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, fekk orðið á einum lærdum háskúla í New York**

- Eg skilji ikki, at ein so høgt mettur lærdur háskúli sum Colombia University skal bjóða einum lygnara at halda røðu fyri teimum lesandi. Maðurin heldur jú uppá, at nazistarnir gjørdu ikki jødunum nakað. Hetta endurtók hann eisini fleiri ferðir á lærda háskúlanum hendan dagin. Maðurin er staðfestur sum lygnari, sigur Shimon Peres við Reuters.

Ísraelski forsetin heldur, at tað, sum hendir við Mahmoud Ahmadinejad og Iran minnir ikki sørt um tað, sum hendi Adolfi Hitler og Týsklandi í árunum undan seinna heimsbardaga.

- Men valdu at tingast við Hitler. Chamberlain fór at tosa við hann. Men hvat kom burturúr? Jú, tað eydnaðist Hitler at fjala, at hann var í ferð við at byggja týningarlegur til jødarnar og onnur, sigur Shimon Peres.

### STUTT SAGT

#### Óvæntað gos

Jarðfrøðingarnir í Ný Sælandi stóði sum Kánus, tá gosfjallið Mount Ruapehu brádliga fór at goysa í gjárkvøldið. Nógv fólk vóru í fjøllunum og stóðu á skíð, og tey máttu fáast oman í skundi. Gosið vardi sjey minuttir, men nú vænta jarðfrøðingarnir, at fjallið fer at goysa aftur hvørja løtu. Mount Ruapehu er mitt ímillum teir stóru býirnar Wellington og Auckland, og tað kom eisini púra óvart á fólk og myndugleikar har, at fjallið fór at goysa í gjárkvøldið.

#### Ikki til Myanmar

Fleiri danskar ferðaskrivstovur hava valt at strika Myanmar av ferðaskránni orsakað av teirri spentu støðuni har. René Andersen, stjóri á ferðaskrivstovuni Hannibal & Marco Polo, sigur við Ritzau, at tey hava eingi ferðafólk í Myanmar nú, og at allar ætlaðar ferðir í heyst eru avlýstar. Síðani 1998 hevur danska stjórnin mælt ferðaskrivstovum frá at senda fólk til Myanmar, tí tað kann tulkast sum stuðul til hernaðarstýrið her, men skrivstovurnar hava ikki gjørt eftir áheitanini.

#### Svii sendast til USA

Í Kekkia hava myndugleikarnir gjørt av at eftirlíka einari amerikanskari áheitan um at útflýggja Oussana Abdullah Kassir, sum sambært amerikanska ákæruvaldinum hevði eina yvirgangsvenjingarlegu í statinum Oregon í 1999. Tann 40 ára gamli Kassir er svenskur ríkisborgari, og amerikanararnir hava lovað, at hann kann fáa løgfrøðiliga hjálp úr Svøríki og Týsklandi, tá hann kemur fyri rættin. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa lívlangt fongsul.